einfaldari
- ger tað einfaldari

Desember 2011

# Jóna heima aftur



Jóna Gunnarsson, sum hevur verið í tænastu hjá OM í Chile, er nú heima aftur. Hon er komin heim at njóta eina tíð saman við familjuni.

Í januar fer hon yvir aftur til Chile saman við familjuni, og har verður hon til fyrst í mars, tá hon kemur heim aftur til Føroyar í eina tíð. Jóna sigur, at hon er glað fyri at vera heima aftur og at sleppa at vera saman við familju og vinum.

lívdin
– í lívd hins hægsta

Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

### Kvinnur fyrstu boðberar

Hendingin, tá ið Jesus talaði við samversku kvinnuna við Sikarsbrunn, er ein rørandi hending (Jóh. 4:1-42). Her síggja vit Jesus slóðbrótandi og fyrimyndarliga vísa eini kvinnu virðing, sum í síni samtíð einki hevði at týða. Men Jesus gjørdi meira enn tað. Fyri fyrstu ferð í evangeliunum opinberar Jesus guddómleika Sín, tá ið Hann sigur við hana: "Tað eri Eg, Hann, sum talar við teg" (Jóh. 4:26). Og hetta varð opinberað eini heidnari samverskari kvinnu! Er tað ikki hugvekjandi at hugsa um, at Harrin valdi kvinnur sum fyrstu boðberarnar av guddómleika og uppreisn Síni!

*Jógvan Zachariassen*



## Hendingar & tiltøk

### Christmas Child nýggjan leiðara




Eitt av oddafólkunum í Christmas Child í Føroyum, Durita Djurholm, sum hevur verið við frá byrjan í 2003, ætlar sær nú at gevast.

Hóast nýggja heimasíðan lættir nógv um kunningararbeiðið, og arbeiðið koyrir væl, kennir hon tað nú soleiðis, at tíðin er komin at gevast í hesum arbeiði. Hon er takksom fyri øll tey, sum hava staðið saman við henni í hesi tænastu - bæði í Lívdini og kring alt landið. Nevndin heldur fram, men tørvur er á forkvinnu/-manni í nevndini, um arbeiðið skal halda áfram.

Tiltakið Christmas Child byrjaði í sunnudagsskúlanum í Lívdini í 2003. Sunnudagsskúlin arbeiddi við endamálsorðing og arbeiðsætlan, har lagt bleiv til rættis, hvussu endamálini kundu útinnast í verki.

At vera við í Christmas Child var ein máti at útinna endamálini "trúboðan" og "tænastu", tí tá geva vit til tey fátæku, og gávan verður nýtt sum ein liður í trúboðan. Allastaðni, har tað er møguligt, verður ein bóklingur um skapanina, syndafallið, Jesu lív og frelsuna givin børnunum á teirra máli. Bóklingurin greiðir væl frá, at øll menniskju hava brúk fyri at blíva frelst, og gleðiboðskapurin verður væl fortaldur við myndum og teksti.

Christmas Child hevur síðani 2003 savnað inn 27.536 skógvaeskjur í Føroyum og uml. 700.000 kr eru fluttar til Samaritan's Purse til flutningskostnað og annað arbeiði.

Bæði í Føroyum og úti í heimi er Christmas Child við til at fremja einleika millum savnaðir, og tað er til stóra gleði fyri øll. Nevndin í Christmas Child er nú mannað við umboðum úr "øllum" Føroyum og úr ymsum savnaðum. Tað er inspirerandi og gevandi at arbeiða felagskristiligt. Á

www.christmaschild.fo sæst, hvør er í nevndini. Um tú ynskir at yvirtaka formanspostin, so ert tú vælkomin at kontakta Duritu á tlf. 230833 ella onkran í nevndini.

### Regin við fløgu á italskum



Regin Guttesen hevur ætlanir um at geva eina fløgu út á italskum. Eitt evangeliskt, kristiligt útgávufelag (Re-Vive Records) hevur avgjørt at geva út fløguna í Italia og í Sveis. Tey taka sær av at umseta og upptaka sangin á italskum og av framleiðslu og útgávu.

## List í Lonini






Frá hósdegnum 8. desember til hósdagin 15. desember verður ein listasýning í Lonini. Framsýnarar verða Astrid Mouritsen, Edith Mørkøre, Hedvig Jóhansdóttir og Magni á Lakjuni.

## Kalendarin hjá NTM

Kalendarin hjá New Tribes Mission fyri 2012 er komin og er at fáa á kunningarborðinum í Lívdini. Fyri hvønn mánað er ein mynd ymsastaðni frá í heiminum, har sum felagsskapurin arbeiðir.

## Til lukku við barninum



23. juni 2011 fingu Irdi og Ken Nónklett í Havn sonin Nikolas. Hann var 56 cm langur og vigaði 4.400 gr.

## Opið hús í Lonini

Hósdagar frá kl. 16.00 til 18.30 er opið hús í Lonini. Ætlanin er, at opið hús skal vera í Lonini hvønn hósdag í vetur, har øll eru vælkomin inn á gólvið til drekkamunn og góða samveru.

## Samtalur og forbøn

Fólk frá Glóðini eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu. Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við sum t.d. tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti ella tvístøður.

Fólkini í Glóðini hava tagnarskyldu. Eisini ber til at venda tær til Glóðina á tlf. 280011.

## Minibíbliuskúli og bønarmøti




Minibíbliuskúli er týskvøld í Lonini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 er Minibíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 er bønarmøti. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, læru og bøn.

## Skráin fyri týskvøldini desember 2011

*Týskvøldið 6. desember*
Høvi at spyrja spurningar um lív og læru Jesusar

*Týskvøldið 13. desember*
Kyknubólkar (Lonin opin til bøn og samveru frá kl. 20.30)

*Týskvøldið 20. og 27. desember*
Jólafrí



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

### Sunnudagin 4. desember

Familjumøti kl. 10.30: Evni: Hvat er breyðbróting?
Jógvan Zachariassen hugleiðir

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Kann eg ivast?
Talari: Johan Syderbø



Jógvan

### Sunnudagin 11. desember

Familjumøti kl. 10.30: Jóna Gunnarsson luttekur

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Kann eg stúra? Jógvan Zachariassen stílar fyri



Johan

### Sunnudagin 18. desember

Familjumøti kl. 10.30: Jólamøti

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Jólamøti



Jóna

### Sunnudagin 25. desember

Jólafrí

### Sunnudagin 1. januar

Nýggjársmøti kl. 12
Bert eitt møti frá kl. 12.00-13.00

### Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00



*Fyrivarni verður tikið fyri broytingum.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*